## Fiskimenninir skuldu átt RG

Grønlendska fiski- og veiðimannafelagið KNAPK tekur undir við teimum, sum mæla politikarunum til at einskilja ta almennu fyritøkuna Royal Greenland. Formaðurin, Leif Fontaine, sigur við kringvarpið í Nuuk, at tað rætta var, at teir grønlendsku fiskimenninir áttu tann grønlendska partin av Royal Greenland. Leif Fontaine sigur, at ongastaðni fáa fiskimenn so lítið fyri fisk og krabba sum í Grønlandi, og kortini fekk Royal Greenland 500 milliónir krónur í almennari hjálp í fjør, sigur hann.



## Skjótt at fiska kvotuna

Herfyri fingu norsk skip loyvi til at fiska 28.400 tons av lodnu í norskum sj+øki í vetur. Áhugin vísti seg at vera stórur, og nógv norsk skip lógu uttan fyri íslendska markið og bíðaðu eftir at sleppa innum at fiska kvotuna. Tað gekk eisini skjótt. Íslendska fiskiveiðieftirlitið sigur, at tey fyrstu norsku skipini byrjaðu fiskiskap 2. februar, og um vikuskiftið var kvotan fiskað. 79 norsk lodnuskip høvdu loyvi at royna í íslendskum sjógvi, men bara 31 teirra brúktu loyvið, skrivar Morgunblaðið.

# Vakmyndatól í svimjihøllini



*Vakmyndatól er nú sett upp í høllini*

**Klaksvíkar kommuna hevur sett upp vakmyndatól í svimjihøllini av trygdarorsøkum, tí okkurt bendir á, at fólk eru í høllini uttan fyri vanliga tíð**

TRYGD
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í svimjihøllini í Klaksvík hava tey leingi havt varhugan av, at fólk ofta hava verið inni í høllini, tá ið høllin annars ikki hevur verið opin.

Orsøkin kann hava verið, at nógvir lyklar til høllina hava verið í umfari, og tí fekk høllin herfyri nýggja digitala lyklaskipan, og nú skulu øll, sum fáa lykil gjalda fyri hann og kvitta fyri móttøku.

- Tað er ikki rætt, at fólk eru i høllini uttan fyri vanliga tíð, og tí hava vit av trygdarorsøkum fingið sett upp vakmyndatól í høllini, sigur Dávur Winther, leiðari á mentanardeildini í Klaksvíkar býráð.

Skuldi tað hent, at onkur breyt inn í svimjihøllina á náttartíð, er eisini hent at hava vakmyndatól, sum kann avdúka óbodnu gestirnar.

Kommunan fekk loyvi frá Dátueftirlitinum at seta tólið upp.

## Slóðin flytir úr Havn

**Fyrsta dagin fer Nærverkið at lýsa eftir hølum til stovnin Slóðina, sum skal hava høli onkra aðrastaðni enn í Havn**

NÆRVERKIÐ
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Stovnurin Slóðin skal flyta, men hvagar?

Spurningurin stendur framvegis opin. Nærverkið helt tað vera eitt gott hugskot at flyta stovnin niðan í Mjørkadal, men tað hildu onnur ikki, og ætlanin varð slept.

Síðan hava fleiri húseigarar vent sær til Nærverkið og boðið høli síni fram.

- Eini átta-tíggju ítøkilig tilboð eru, og tey koma allastaðni frá í landinum. Nú fara vit undir samráðingar við tey, sigur Mary í Garði, stjóri í Nærverki.

Samstundis sita tey í Nærverkinum og orða eina lýsing, tí skal Nærverkið leigað, skal tað bjóðast út alment.

Slóðin letur aftur í verandi húsum í hesum mánaðinum.

- Tey bæði børnini á stovninum verða ikki slept upp á fjall, tí vit hava eina fyribilsloysn, sigur Mary í Garði, sum tó ikki vil siga, hvør henda fyriloysn er.

Mary í Garði væntar, at stovnurin flytir inn í nýggjum hølum um nakrar mánaðir, og greitt er, at hesin stovnurin fær heimstað uttan fyri Havnina. Tað hevur alla tíðina ligið í kortunum, og grundgevingin er, at ov nógvar freistingar eru í býnum. Kravið er, at børnini skulu vera nær við skúla og frítíðarskúla og helst eisini vera nær arbeiðsplássum.

# Klaksvík áhugað í Bládýpinum

**Klaksvíkar býráð fer at kanna, um til ber at læna listaverkið Bládýpið hjá Tróndi Paturssyni eitt skifti**

LIST
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Enn er tað ikki nakað ítøkiligt ppskot, men í býráðsumsitingini í Klaksvík hava tey tosað um, at kommunan møguliga skal bjóða seg fram at taka sær av listaverkinum Bládýpið hjá Tróndur Paturssyni ella at læna verkið norður til Klaksvíkar eitt skifti.

Bládýpið er verkið, sum stendur forfjónaðá parkeringsplássinum beint við Listasavn Føroya, og sum stjórin á savninum vil hava burtur av økinum.

Dávur Winther, leiðari á mentanardeildini í Klaksvíkar býráð sigur, at býráðið einki víðari hevru gjørt við uppskotið annað enn at tosa við Helga Fossadal, stjóra á Listasavni Føroya.

Helgi Fossadal sigur við Sosialinum, at hann hevur onga viðmerking til uppskotið, tí savnið hevur einki við Bládýpið at gera.

- Vit ráða ikki yvir Bládýpinum. Tað kunnu tey tosa við Trónd Patursson um, sum eigur Bládýpið, sigur hann.

Dávur Winther sigur, at í býráðnum hava tey heldur ikki tikið støðu til, hvar Bládýpið skal standa, um kommunan sleppur at læna tað. Spurningurin er eisini, um tað tolir at verða flutt.

- Men hevði verið stuttligt at víst tað fram her í Klaksvík til dømis í summar, sigur Dávur Winther.

Næsta stigið hjá Klaksvíkar býráð verður at tosa við Trónd Patursson.



*Klaksvíkar býráð kundi hugsað sær at lænt Bládýpið til dømis í summar*